HOYVÍKAR SKÚLI

Ársfrágreiðing 2018

Skúlastýrið í Hoyvíkar skúla hevur gjørt enn eina roynd at fáa gongd á bráfeingis umvælingarnar í skúlanum. Skúlastýrið sendi enn eitt skriv til Tórshavnar kommunu tann 31. januar 2018.
Afturboðanin frá kommununi var, at peningur var settur av til at gera ávísar umvælingar av skúlanum. Talan er um klædningin og vindeyguni í elsta parti av skúlanum, ið venda oman móti skúlagarðinum umframt tekjuna og klædningurin á vestara bygningi. Tórshavnar kommuna boðaði skúlastýrinum frá, at arbeiðið fór at vera gjørt á sumri 2018.
Tað vísti seg tó, at arbeiðið enn einaferð ikki varð gjørt. Húsaumsitingin greiddi frá, at útboðið av arbeiðinum dróg út, og at húsaumsitingin hevði trupult við at finna arbeiðstakarar til umvælingina.
Tí verður ásetta umvælingararbeiðið ikki gjørt fyrr enn í 2019. Leiðslan í Hoyvíkar skúla hevur í hesum sambandi boðað Tórshavnar kommunu frá, at umvælingararbeiðið í minstan mun skal ganga út yvir skúlagongdina hjá næmingum og starvsfólki.

Í langtíðaríløguætlanini hjá Tórshavnar kommunu stendur, at peningur er settur av til at dagføra Hoyvíkar skúla. Á býráðsfundi tann 29. novenber 2018 var samtykt, at Hoyvíkar skúli fær játtað 10 mió. kr. í 2020, 10 mió. kr. í 2021, 10 mió. kr. í 2022 og 20 mió. kr. í 2023.

Nýggj girðing og hegn er sett upp rundan um sparkivøllin í skúlagarðinum. Arbeiðið skuldi eftir ætlan verið liðugt við skúlabyrjan skúlaárið 2017/2018, men arbeiðið dróg út. Nú er arbeiðið so gjørt, og Hoyvíkar skúli gleðist um úrslitið.

Hesi viðurskifti eru endaliga avgreidd í skúlastýrinum:

- Ferðslutilmælið í Hoyvíkar skúla verður endaliga samtykt í skúlastýrinum.
  Tilmælið verður lagt á heimasíðu skúlans.
- Skúlstýrið samtykkir eisini ein telefonpolitikk fyri Hoyvíkar skúla.
  Telefonpolitikkurin verður somuleiðis lagdur út á heimasíðu skúlans.
- Ein tillaging verður gjørd í perkeringsviðurskiftunum í skúlagarðinum.
  Nú er ikki loyvt at parkera í skúlagarðinum í tíðarskeiðnum frá kl. 07:00 – 15:00. Fyrra ásetingin var kl. 08:00 – 15:00. Broytingin skal tryggja, at eingin ferðsla er í skúlagarðinum, tá næmingar og starvsfólk møta í skúla áðrenn klokkan 8:00.
- Ábøtur eru gjørdar á brúsuviðurskiftini í fimleikarhøllini.

Eftir fleiri áheitanir frá skúlastýrinum eru ljósmastrar komnar á horninum niðast á Kirkjustræti/Karlamagnussarbreyt. Ljósmastrar er settar upp beint við skúlan, har næmingar verða settir av um morgunin. Hetta er sera gott fyri trygdina og ger tað vandaleysari í myrku tíðini.

Ein trivnaðarætlan skal gerast fyri Hoyvíkar skúla. Arbeiðið hevur verið ávegis í eina tíð, og leiðslan hevur sett sum mál, at trivnaðarætlanin verður løgd út á heimasíðu skúlans í seinnu hálvu av skúlaárinum 2018/2019.

Árligi foreldrafundurin hjá skúlastýrinum verður ásettur at vera hósdagin 7. februar 2019. Avgjørt er at heita á Jógvan Fríðriksson, bisp, um at halda ein fyrilestur og hugleiða um evnið ”Nærvera og at vera til staðar í løtuni”.